Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)

(Skattaumskipan 2024 og 2025, stigvís minking av fiskimannafrádráttinum, samdøgursfrádráttinum og uttanlandsfrádráttinum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin), sbrt. løgtingslógarkunngerð nr. 109 frá 19. september 2023**,** verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 33, nr. 12 verða 3. og 4. pkt. orðað soleiðis:
"Frádrátturin, sum verður veittur sum ein samdøgursfrádráttur, kann tilsamans ongantíð verða størri enn skattskylduga uttanlandsinntøkan. Frádrátturin er í
a) 2024: kr. 240.
b) 2025: kr. 180.
c) 2026 og frameftir: kr. 120."

2. § 33, nr. 13 verður orðað soleiðis:
"13) 30% av skattskyldugari inntøku, sum er fevnd av § 25 b, stk. 1, tó í mesta lagi:
a) Fyri 2024: kr. 96.000.
b) Fyri 2025: kr. 72.000.
c) Fyri 2026 og árini fram: kr. 48.000."

3. § 33, nr. 17 verður orðað soleiðis:
"17) 14% av veiðiinntøkuni upp til:
a) Kr. 400.000 fyri 2024.
b) Kr. 300.000 fyri 2025 og fylgjandi ár."

4. § 154 b verður strikað.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.

Samtykt á Løgtingi hin 15. desember 2023 við 18-0-15 atkvøðum.

forkvinna

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 18. desember 2023

stjóri

LM-037/2023